## Stuttlig sms úr »3. hálvleiki«

Lurtarnir hjá Rás2 vóru væl fyri mikukvøldið. Hesi trý sms´ini vunnu hvør sítt atgongumerki til landsdystin millum Føroyar og Serbia á Tòrsvølli tann 3. september.

**1** *»Ultras« til Sandoy at trumma, men mugu heimaftur við tómum lumma.*
**2** *Sámal er »Ímundin« av B36.*
**3** *Andrew av Fløtum stóð ikki á sínum føtrum.*

***Onnur góð sms :***

- *Tað er meiri møði enn føði at síggja dómara á altjóða støði, í áskoðarafjøld fáa øði. Hvat, ið hann Petur dømir og metur, kanska hann fortelur í vetur.*
- *Ransin var skansin við margáir*
- *Nú er SVANGligt á SKARÐinum*
- *Táið Tróndur varpar út, so hevur hann sum oftast eitt gott ARGE-ment.*
- *Tað eru bara gulir sum eru kulir. Koyr á NSÍ.*
- *1248, 1249, 1250, 1251, 1252......eri ikki komin niður á jørðina enn. Dómarin vildi bara hava, at HB fekk stig í dag. Lort í hann!!*
- *Eg hopi ikki, at tað verður pollamjørki, sum ger av við B71 í dag.*

# Leiðreglur fyri góðan atburð

**ÍSF Góður atburður er eitt minstakrav, tá talan er um góðan ítróttarsið. Bæði inni á leikvøllinum, og uttanfyri leikvøllin. Skrivarin hjá ÍSF staðfestir, at tað er týdningarmikið at endurtaka hesar leiðreglur við jøvnum millumbilum**

Heri Simonsen




*Katrin Joensen, ÍSF skrivari, við leiðireglunum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Katrin Joensen, skrivari í ÍSF var í Rásarúminum hjá Rás2 mikukvøldið. Fyrsti spurningurin vit í Miðlahúsinum stillaðu til skrivaran hjá ÍSF, var hví ÍSF á fyrsta sinni gjørdi leiðreglur fyri góðan atburð á leikvølli, og uttanfyri leikvøllin. – Tað er soleiðis, at vit í ÍSF ynska at gera okkara til, at tað ítróttarliga umhvørvið til eina og hvørja tíð, er eitt gott og trygt umhvørvið, har tey íðkandi kunnu kenna seg væl, og kunnu kenna seg vird, og koma saman í gleði. Tí hildu vit, at tað var rætt at festa á blað nakrar leiðreglur um góðan atburð. Katrin greiddi frá, at tey hava hugt eftir hvussu grannalondini hjá okkum hava gjørt slíkar leiðreglur, men at leiðreglurnar hjá ÍSF tó taka støðið í tí føroysku mentanini.

### Yvirhøvur góður atburður

Spurd um vit eru á rættari leið, tá tað kemur til atburðin á leikvøllum, og uttanfyri vøllin. – Yvirhøvur so sýna fólk ein góðan atburð. Hinvegin so haldi eg, at vit til alla tíð kunnu minna hvønn annan á, at gera tað betur. Ein kann jú gerast ógvuliga spentur, og tá er skjótt, at ein hevur ein atburð, sum ikki hóskar seg, og als ikki er fyrimyndarligur. Ein má hava í huga, at børn og ung hava eitt vakið eyga við hvussu vit sum vaksin – og foreldur – bera okkum at. Leiðreglurnar venda sær til børn, til foreldur, til venjarar, til vaksin íðkandi, til leiðarar, og eisini til dómarar og hjálparfólk.

### Foreldur mugu verða fyrimyndir

Orsøkin til, at vit hava tikið leiðreglurnar fram aftur, og hava lagt tær út á heimasíðuna er, at júst hesa tíðina byrjar nógvur ítróttur venjingarnar aftur. Tá standa børn og foreldur í bíðuraðum, fyri at verða partur av hesum serliga umhvørvinum, tí hildu vit, at hetta er eitt gott høvið at taka leiðreglurnar fram aftur. Hugskotið er, at tá foreldur møta saman við sínum foreldrum til tann fyrsta foreldrafundin, so verður kanska spurt, hvat vit vænta sum foreldur, og hvat væntar ítróttarfelagið av sínum limum (børnum)? Tá er tað avgjørt eitt gott hugskot, at ítróttarfeløgini tóku upp hvussu neyðugt tað er, at foreldur sýna góðan atburð. – Foreldrini hava ein týdningarmiklan leiklut í ítróttini. Tað er týdningarmikið, at børnini sýna góðan atburð á vøllinum, men samstundis er tað týdningarmikið, at foreldrini sýna góðan atburð á síðulinjuni. Fyrsta regla til foreldur er: »Minst til, at barnið er við í ítrótti, fyri sína egnu gleði, og ikki fyri tína egnu gleði«. Katrin leggur herðslu á, at eisini er týdningarmikið, at foreldrini minna hvønn annan á hesi viðurskifti.

### Sami tráður

Áminningarnar til venjarar, børn, leiðarar, dómarar, hjálparfólk, vaksnum íðkandi og foreldur eru eitt sindur ymiskar, men tráðurin sum gongur ígjøgnum er, at øll hava virðing fyri hvørjum øðrum. – Vit eiga at fara við øðrum, sum vit vilja verða viðfarin sjálvi. Vit mugu virða dómaraavgerðir, og vit mugu laga okkum eftir teimum reglunum, sum eru í tí ávísu ítróttargreinini, og tí ávísa ítróttarfelagnum. Ein onnur orsøk til, at ÍSF endurtekur leiðreglurnar er, at nýggj fólk leggjast aftrat ítróttarfeløgunum alla tíðina, og tí mugu tey sum leggjast aftrat av góðum atburði bæði á leikvøllinum, og uttanfyri leikvøllin.

# ANSNI høvuðsstuðul hjá Kyndli




*Kyndil og ANSNI hava skrivað undir stuðulsavtalu fyri kappingarárið 2010/2011. F.v. Uni Arge, næstformaður, Anja Heinadóttir, spælari á 1. kvinnuliði, Helgi O. Justinussen, stjóri í ANSNI, Hans Áki Dal-Christiansen, spælari á 1. mansliði, og Anna Rein, forkvinna*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**HONDBÓLTUR Kyndil og trygdarfelagið ANSNI hava gjørt avtalu um, at ANSNI verður høvuðsstuðul hjá Kyndli kappingarárið 2010/2011**

Tíðindaskriv

Avtalan hevur við sær, at búmerkið hjá ANSNI verður sjónligt á troyggjunum hjá bæði 1. mansliði og 1. kvinnuliði hjá Kyndli komandi kappingarár.

ANSNI er trygdarfelag, sum hevur til endamáls at veita einstaklingum og virkjum ymisk sløg av trygdarloysnum í eini tíð, har váðin allatíðina broytist. Felagið heldur til í húsunum yvir av Effo-støðini í Gundadali, ið fyrr vóru støð hjá Bil.

Anna Rein, forkvinna í Kyndil, fegnast um avtaluna við ANSNI:

– Nógv fíggjarlig orka krevst at reka eitt hondbóltsfelag, og at ANSNI hevur játtað at gerast okkara høvuðsstuðul, gevur okkum gott treysti at fara undir kappingarárið. Talan er um eina professionelt rikna fyritøku, sum vit gleða okkum at samstarva við, sigur hon.

Stjórin í ANSNI, Helgi O. Justinussen, fegnast eisini um avtaluna:

– Kyndil hevur altíð staðið seg væl, serliga hjá monnunum, og vit hava lagt til merkis, at felagið eisini ætlar at gera um seg hjá kvinnunum í ár og stendur seg sera væl í ungdómsdeildunum. Tí fegnast vit um at stuðla felagnum, sigur hann.

ANSNI verður eisini sjónligt á nýggju heimasíðuni hjá Kyndli, ið verður almannakunngjørd í sambandi við nýggja kappingarárið, og á tiltøkum, sum Kyndil fer at skipa fyri.

Aðrir stuðlar hjá 1. mansliði hjá Kyndli komandi kappingarár verða Eik, Effo og SMS.

post@sosialurin.fo